## Skeyt tvey sjálvmál

Georgiski Kakha Kaladze er ein væl dámdur maður í Italia í dag. Verjuspælarin, sum dagliga spælir í Milan, skoraði nevnliga bæði málini, tá Italia vann 2-0 móti Georgia. Trupulleikin hjá Kaladze er bara, at hann spælir við Georgia. Talan var annars um málleysan fyrra hálvleik, men við tveimum, sjálvmálum syrgdi Kaladze fyri, at Italia helt fast um sína kós móti HM-endaspælinum.



## Rooney sum sjónleikari

Sjálvt enskir miðlar øtast um brotssparkið, sum Wayne Rooney fekk til Ongland í 2-1 sigrinum á Slovenia. Í nærdysti við Bostjan Cesar metti dómarin, at Rooney varð feldur, men størsti parturin av áskoðarunum mundu halda, at Rooney í fyrsta umfari helt fast í verjuspælaranum, og í øðrum umfari kanska átti kort fyri at tveita seg í beinini á Cesar. Eitt nú skrivaði the Times eftir hendingina, at svenski dómarin, Jonas Eriksson, kanska mundi vera gudssonur fyrrverandi enska landsliðsvenjaran, Sven-Göran Eriksson.

# Vónsvikin venjari



**Tað var ein vónsvikin landsliðsvenjari, sum fór av UCP-stadion í Graz leygarkvøldið**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**Brian Kerr var alt annað enn nøgdur við føroyska avrikið í fyrra hálvleiki, men læt væl at seinna hálvleiki. – Men vit fingu tríggjar karantenur, so vit mugu umskipa liðið og kalla nýtt fólk inn til heimadystin ímóti Litava mikudagin, segði hann**




Hilmar Jan Hansen

Tað skiltist á øllum brøgdum, at Brian Kerr leygarkvøldið gav ilt av sær í hálvleikinum, eftir at hann í sínum fyrsta útidysti sum landsliðsvenjari hjá Føroyum hevði sæð eitt sera vánaligt avrik á vøllinum í Graz ímóti Eysturríki, sum longu fyrsta korterið hevði lagt seg á odda 2-0.

– Í hálvleikinum hevði eg skift nógvar av spælarunum út, um eg kundi gjørt tað. Men eg segði so við teir, at teir fingu 5-10 minuttir til at bøta um avrikið, og tað haldi eg, at teir gjørdu. Eg var sera vónsvikin eftir fyrra hálvleik, men eg haldi, at menninir spældu við dirvi og ágrýtni í seinna hálvleiki, segði Kerr eftir dystin.

– Vit høvdu stórar trupulleikar ímóti teimum báðum stóru monnunum, teir høvdu har frammi, og yvirhøvur var tað so í fyrra hálvleiki, at okkara spælarar runnu aftaná og vóru við undirlutan á fleiri mótum. Tað sá sanniliga ikki gott út hjá okkum, og eg bað spælararnar fara inn at royna at vinna seinna hálvleik, tí so vóru vit brádliga við aftur. Vit fingu so javnleik í seinna hálvleiki, og tað var gott.

### Tríggir burturi

Brian Kerr segði seg vóna, at føroyska liðið kundi læra nakað av dystinum í Graz, tí brúk er av álvara fyri seg, at liðið reisist aftur mikudagin, tá tikið verður ímóti Litava á Svangaskarði.

– Sálarliga var hetta eitt bakkast, men vit mugu bara royna at reisast aftur, bæði sálarliga og likamliga. Ein stórur trupulleiki var, at vit dugdu ov illa at halda fast í bóltinum, tá vit høvdu hann, og tí gjørdu vit tingini torfør fyri okkum sjálvar, segði hann.

– Men okkurt er kortini, sum vit kunnu fegnast um. Millum annað hava vit sæð, at vit í hinum dystunum hava skapt nógvar kjansir, men ikki fingið mál. Nú skaptu vit ikki serliga nógv, men fingu so eitt gott mál, og tað gleðast vit um.

Í seinna hálvleiki, tá føroyska spælið var nógv betri, tóktist innsatsurin meira heilhjartaður, og tað vísti seg eisini í nærdystunum. Fýra gul kort vórðu givin, og hóast okkurt teirra ikki var í familju við gult, so merkti tað kortini, at Kerr undan Litava-dystinum noyðist at vera tríggjar av sínum spælarum fyriuttan.

– Bæði Fróði Benjaminsen, Bogi Løkin og Atli Danielsen hava nú karantenu, men so mugu vit kalla aðrar inn og umskipa liðið, umframt at tað hevði verið gott, um Jóhan Troest Davidsen aftur varð klárur. Vit hava tríggjar dystir eftir í hesi kappingini, og er tað nakar annar dystur, har vit hava ein kjans, so er tað mikukvøldið ímóti Litava, segði venjarin.

– Vit hava veruliga brúk fyri, at hvør einstakur spælir væl, fyri at vit skulu fáa nakað burtur úr heildini Hesa ferð spældi hvør einstakur ikki nøktandi, men eg trúgvi hinvegin, at fleiri av spælarunum, sum ikki rukku hæddirnar í kvøld, fara at læra av hesum og geva ein betri innsats mikukvøldið.

### Brúk fyri stuðli

Dysturin leygarkvøldið var spældur nokk so seint, og hartil fór stórur partur av degnum í gjár til ferðing, so tí væntar Brian Kerr, at fyrireikingarnar til dystin mikudagin ímóti Litava fyri tað mesta fara at fevna um taktiskar venjingar.

– Vit skulu leggja dystin ímóti Eysturríki aftur um okkum, tí realistiskt sæð, so møttu vit einum eysturrískskum liði í viðgongd, eins og feløgini her hava gjørt tað gott í europeisku kappingunum. Maiarhofer er júst komin til Wolverhampton og Janko var ein av bestu málskjúttunum í øllum Europa síðsta kappingarár, segði hann.

– Hartil vita vit, at Eysturríki jú hevur yvir átta milliónir íbúgvar og var nóg stórt til saman við Sveis at hýsa EM-endaspælinum í fjør, meðan vit eru ein lítil tjóð, sum altíð má royna at gagnnýta allar teir møguleikar, vit kunnu fáa.

Brian Kerr nýtti eisini høvi til at takka teimum áskoðarum, sum høvdu leitað sær til Graz at stuðla liðnum og vónaði, at uppbakkingin aftur mikudagin verður stór:

– Tað var veruliga hugaligt at síggja, at nógvir føroyingar vóru komnir higar at stuðla liðnum, og sjálvt ímóti endanum av dystinum hoyrdust teir. Tí vóna vit sjálvandi, at tá vit mikukvøldið á Svangaskarði taka ímóti Litava, verða tað nógv, ið vilja koma at stuðla okkum og hjálpa okkum til eitt gott úrslit.

## Fegnast um plikt-sigurin

**Fjølmiðlarnir í alpulandinum eru samdir um, at tann góða byrjanin beindi fyri øllum óttanum, um enn ein ræðuleika fyri eysturrískskan fótbólt**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í teimum eysturríksku miðlunum gongur orðið "pliktsigur" nógv aftur.

- Eysturríki hevur hevnt seg fyri 1-1 javnleikin í oktober í fjør, og hevur varðveitt spinklu vónini fyri at røkka HM-endaspælinum. Sigurin vermur væl, áðrenn dystin ímóti Rumenia í komandi viku. Soleiðis orðar blaðið "Der Standard" seg um 3-1 sigurin ímóti Føroyum. Blaðið skrivar eisini, at Jákup Mikkelsen forðaði fyri fleiri málum, og at málið hjá Andrias Lava Olsen var einasti málmøguleikin hjá Føroyum í øllum dystinum.

- Við Marc Janko og Stefan Maierhofer hevur eysturríksi tað størsta álopspárið í eysturríksku landsliðssøguni, skrivar eysturríkska kringvarpið "ØRF" á heimasíðu sínari. Her sipar ØRF til stóru hæddina hjá Marc Janko og Stefan Maierhofer. ØRF leggur dent á, at málið hjá Andrias Lava Olsen forðaði fyri tí størsta føroyska tapinum í hesari undankappingini.

Harmleysir føroyingar - Alt var klárt aftaná 49 sekundir, skrivar "Neue Krone Zeitung". - Constantini mátti bara bíða 49 sekund fyri at síggja úrslitið av venjingunum seinastu vikuna. Neue Krone Zeitung nevnir góða málið hjá Andrias Lava Olsen "Resultatkosmetik".

Blaðið "Kurier" tekur dýran til, og spyr hvussu tað ber til, at eysturríkska liðið fyri einum ári síðani kom í ta pínligu støðu at spæla javnleik 1-1 ímóti hesum mótstøðuliðnum. Kurier skrivar, at føroyska liðið var "sympatiskt", men ikki nakar sterkur "sparringspartnari". Føroyar fingu sítt bert næsta mál í kappingini, og aftur var tað Eysturríki, sum hjálpti til.